


# Strævnir og langir dagar

Oyggjaleikirnir eru ein stórhending fyri ítróttarfólk á 24 oyggjum. Fólk hava stóran áhuga fyri kappingunum, og tí eru fjølmiðlarnir eisini væl umboðaðir til Oyggjaleikirnar.

Hesaferð var tað eitt metstórt tal av fjølmiðlafólki, sum fylgdu Oyggjaleikunum í Hetlandi, og tað var ovmikið at gera allatíðina.

Tær mongu kappingarnar, sum verða hildnar á ymsum støðum, gera, at fotografar og journalistar skulu renna sum um ein vissur var í hølunum á teimum. Tað kann gerast ov nógv til tíðir, og út á kvøldarnar sóust nøkur troytt andlit í pressusentrinum, sum hetlendingar høvdu riggað til í Clickimin ítróttardeplinum.

Maðurin á myndin er fotografur – hann umboðar ikki føroysku pressuna, skulu vit gera vart við – og hann var so útlúgvaður tað eina kvøldið, at hann sovnaði oman yvir telduna hjá sær.

Og sum teir góðu kollegar, sum hinir fotografarnir og journalistarnir sjálvandi eru, so vildu teir ikki vakja mannin, fyrr enn teir høvdu tikið myndir av honum. Fotografurin fekk sjálvandi einki at vita um hetta, fyrr enn hann kom aftur til arbeiðis morgunin eftir og ein stór mynd hekk av honum á vegginum. Samstundis varð ein kappingútskrivað, har tað ráddi um at skriva bestu yvirskriftina til myndina, har hann liggur sovandi omaná telduna hjá sær.

Fleiri boð vóru, og eitt tað stuttligasta var:

– Hmm, Føroyar og Áland… flogbóltskvinnur…



*Føroysku áskoðararnir settu dám á allar flogbóltsdystirnar hjá Føroyum*



*Hesin koyrir á flogbóltskvinnurnar í finaluni ímóti Saaremaa, og tað hjápti*



*Fótbóltskvinnurnar høvdu nógvar føroyskar áskoðarar til sínar dystir. Onkran dystin vóru næstan 100 føroyingar og hugdu*